# ítróttur

Nr. 163 • mikudagur • 28. august 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


# Jens Kristian aftur á landsliðnum

**Sjúrður Jacobsen tykist vera fyrsti eykamaður til verjuplássi í vinstru, og Jóhannis Joensen hevur spælt seg longri inn í hitan**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Tjúgu spælarar fáa í dag landsliðsboð. Ætlanin er, at landsliðið skal vera saman frá mikudegnum av. Dysturin ímóti Skotlandi verður annan leygardag klokkan 15 á Svangaskarði, og landsliðið skal halda til í hølunum hjá Tryggingini í Runavík.

Spælararnir hava saman við boðunum fingið at vita, at tveir teirra verða sáldaðir frá nú mánadagin. Kanska verður tað ikki neyðugt at brúka sáldið, tí tað er møguleiki fyri, at onkrir spælarar verða noyddir at geva avboð tí teir ikki eru nóg væl fyri.

Pól Thorsteinsson og Helgi L. Petersen eru millum úttiknu spælararnar. Hvørgin teirra spældi við NSÍ ímóti EB/Streymi. Boð eru eisini eftir veteraninum Jens Kristiani Hansen. Hann var á B36 liðnum ímóti TB. Hetta var fyrsta ferðin, at hann var við í landskappingardysti í ár. Sunnudagin skal B36 á Svangaskarð. Eftir dystin ímóti B68 fer at verða staðfest, um Jens Kristian Hansen er nóg væl fyri at spæla landsdyst. At venjarin hevur sent boð eftir honum er staðfesting av, at veteranurin og fyrrverandi liðformaðurin framvegis er høgt í metum.



*Eftir skaðasteðg er Jens Kristian Hansen úr B36 nú aftur at síggja í landsliðshópinum, har tað helst verður vinstra bakkplássið, sum hann kemur at røkja*

### Ytstu ódnirnar

Eingin ivi er um, at ætlanin er at brúka Jens Kristian Hansen á ytsta verjuplássinum í vinstru. Ímóti Liktinstein var Arnbjørn Danielsen á hesum plássinum. Tað verður hann ikki ímóti Skotlandi. Arnbjørn hevur ikki fingið landsliðsboð hesa ferð. Tað hevur Súni Olsen, sum eftir úttøkuna ímóti Liktinstein gav avboð, heldur ikki fingið.

Harafturímóti eru boð aftur send eftir Sjúrði Jacobsen. Vinstrabeinti NSÍ maðurin var ikki á upprunaliga manningarlistanum ímóti Liktinstein. Hann fekk kom við, tá aðrir góvu avboð, hann spældi eina løtu, og úttøkan hesa ferð bendir á, at Sjúrður er komin longri inn í landsliðshitan.

Jóhannis Joensen var heldur ikki millum teir fyrstu átjan ímóti Liktinstein. Men hann kom úr fýra manna eykaliðnum og uppí átjan manna liðið, tá aðrir góvu avboð. Jóhannis var í høgra verjuborði, og avrikið hjá manninum, sum so ofta hevur sitið á beinkinum, tykist venjarin hava verið so mikið væl nøgdur við, at Jóhannis Joensen nú má metast sum møguleiki at vera millum teir fyrstu ellivu ímóti Skotlandi. At hann er stórur og strekur telur sjálvandi rætta vegin, tá havt verður í huga, at tað er Skotland, sum tað skal spælast ímóti.

Hitt valið til høgra verjuplássið má metast at vera Pól Thorsteinsson. Hann má ivaleyst metast sum favorittur til plássið, um hann verður tøkur. Pól hevur verið skaðaplágaður. Sunnudagin fer NSÍ at spæla á Skála, og tá skal Pól til landsliðspróvtøku.

### Gamlir kenningar

Nýggju menninir, sum vóru við ímóti Liktinstein, hava ikki fingið boð hesa ferð, tá sæð verður burtur frá Sjúrði Jacobsen.

Jens Martin Knudsen og Jákup Mikkelsen eru málverjar. Útispælararnir eru Óli Johannesen, Hans Fróði Hansen, Jón Rói Jacobsen, Pól Thorsteinsson, Jóhannis Joensen, Sjúrður Jacobsen, Jens Kristian Hansen, Jákup á Borg, Hjalgrím Elttør, Fróði Benjaminsen, Julian Johnsson, Sámal Joensen, Rógvi Jacobsen, Heðin á Lakjuni, Helgi L. Petersen, John Petersen, Andrew av Fløtum og Christian Høgni Jacobsen.

Mánadagin verða tveir spælarar sáldaðir frá, um eingin verður noyddur at geva avboð. Býtið av úttiknu spælarunum millum ymsu keturnar kundi bent á, at í hvussu so er ein miðvallari verður annar av teimum, sum fara at verða sáldaðir frá.

# NSÍ er nú millum tey stóra á landsliðnum

**Tað hevur ikki eydnast venjaranum at fáa Toda Jónsson á landsliðið, og nú er útisetatalið komið niður á tveir**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Tað eru tvey sera sjónlig rák í úttøkuni av fyrsta landsliðnum hjá Henrik Larsen, sum skal royna seg í undankapping. Annað er, at útisetatalið er minkað ógvuliga nógv, og hitt er, at NSÍ rættuliga er komið á landsliðskortið.

Tá Henrik Larsen var vorðin venjari, var ein av útsøgnunum, hann kom við, at nú skuldi hann fáa Toda Jónsson aftur á landsliðið. FCK álopsmaðurin er ikki á listanum til Skotlands dystin. Tað vil við øðrum orðum siga, at royndin hjá venjaranum er miseydnað. Fyribilsavboðið, sum Todi sendi Allani Simonsen eftir skaðadystin í Luksemburg 24. mars í fjør, stendur framvegis við.

Á listanum eru bara tveir útisetar – Jákup Mikkelsen, sum er eykamálverji í Molde, og Christian Høgni Jacobsen, sum er fastur maður á liðnum hjá Vejle í næstbestu deildini í Danmark.

Gongdin meðan Allan Simonsen var venjari var tann, at útisetatalið støðugt øktist, og fyri tveimum árum síðani kom tað fleiri ferðir fyri, at tað vóru fleiri útisetar enn spælarar úr heimligu kappingini á átjan manna liðnum. Burtursæð frá teimum báðum omanfyri nevndu eru útisetarnir heilt fáir. Johan B. Hansen tykist vera dottin heilt burtur ímillum, og ungu menninir, sum nú royna seg í Brøndby, eru so mikið feskir, at teir ikki enn koma upp á tal.

### Fýra úr NSÍ

Havnarfeløgini hava altíð átt nógvar landsliðsspælarar. Soleiðis er tað eisini hesa ferð. Fýra HB spælarar eru á liðnum, og tað eru eisini fýra úr B36. GÍ hevur seinnu árini oftast verið væl umboðað. Nú er tað bara Sámal Joensen, sum er millum teir útvaldu.

Inntil í fjør var umboðanin hjá NSÍ á landsliðnum sera lítil. Nú er vent í holuni. Tað er ikki so undarligt. NSÍ er oddalið í landskappingini. Tað er meiri enn ábending um, at á liðnum eru fleiri av bestu spælarunum í landinum.

Kanska heldur onkur, at tað er ein fyrimunur fyri NSÍ spælararnar, at teir hava hjálparvenjaran hjá Henrik Larsen so tætt upp at sær í gerandisdegnum – Jógvan Martin Olsen er jú venjari hjá NSÍ – men hetta kann ivaleyst eisini síggjast frá hinari síðuni. NSÍ spælararnir skulu útinna í minsta lagið tað sama sum hinir – og kanska eitt vet meiri – fyri at sleppa upp í part.

Av fremstu liðunum í landskappingini er KÍ tað, sum er minst umboðað á landsliðnum hesa ferð. Heðin á Lakjuni og Hjalgrím Elttør eru sjálvsøgd val. Atli Danielsen var á beinkinum seinast. Hann er ikki við hesa ferð, men hann eigur framtíðina fyri sær. Felags fyri hann og aðrar ungar KÍ spælarar er, at Jógvan Martin Olsen hevur verið venjari hjá teimum á yngru landsliðunum og tískil væl veit, hvat teir standa fyri, og hvat teir mega í altjóða dystum. Einki er at ivast í, at boð fara at verða eftir fleiri ungum klaksvíkingum í framtíðini, og at fleiri úr øðrum feløgum, sum seinastu árini hava verið á U–17 og U–19 landsliðunum eisini fara at koma nærri landsliðnum.



# Daewoo Marathon cup 2002

**Leygardagin 31. august skipar Ítróttarfelagið Bragdið fyri rennikapping í Havn. Kappast verður á ymsum teinum hjá børnum og vaksnum**

RENNING
*Tíðindaskriv*

Tey vaksnu hava høvi at royna seg á einum av teimum longru teinunum nevniliga hálvmarathon, ið er 21.1 km til longdar. Kappingin hjá teimum vaksnu byrjar og endar á Bursatanga. Runnið verður niðan eftir Áarvegnum, runt um Telefonverkið og Sparikassan, og oman aftur á Bursatanga. Síðani verður runnið yvir við Strond til tyrlupallin, har vent verður heimaftur til Bursatanga. Hendan leiðin skal rennast fýra ferðir.



*Í fjør var undirtøkan til marathonrenningina heilt góð, og vóna fyrireikararnir, at fólk í øllum aldursbólkum aftur í taka væl undir við hesum*

Børnini verða býtt í fýra aldursbólkar.

Dreingir-7/Gentur-7 (f.1995 ella seinni) renna 500 m.
Dreingir-10/Gentur-10 (f.1992-1994) renna 500 m.
Dreingir-13/Gentur-13 (f.1989-1991) renna 1000 m.
Dreingir-17/Gentur-17 (f.1985-1988) renna 1000m.

**Skrá :**
Kl. 12.30 Tilmelding við Bursatanga
Kl. 13.00 Hálvmarathon byrjar
Kl. 13.20 Børn 7 ár byrja
Kl. 13.30 Børn 10 ár byrja
Kl. 13.40 Børn 13 ár byrja
Kl. 13.50 Børn 17 ár byrja

Eisini verður skipað fyri barnarenning á Bursatanga.

Aftaná verða heiðursmerkini handað á staðnum.

**Kappingin partur av Daewoo Marathon Cup**

Kappingin í Havn er samstundis fyrsta umfar av Daewoo Marathon Cup 2002. Hetta er triðja árið á rað, at skipað verður fyri Daewoo Marathon Cup í renning. Henda kapping bleiv roynd fyri fyrstu ferð í 2000 og eydnaðist so mikið væl tað árið og í fjør, at fyrireikararnir hava tikið stig til hava kappingina aftur í ár. Tað eru tey trý feløgini fyri frælsan ítrótt, Treysti úr Norðoyggjum, Bragdið úr Havn og Roysnið úr Eysturoynni, sum saman við P/F Esmar Simonsen á Kambsdali skipa fyri kappingini. Sum flest øllum kunnugt, so er tað P/F Esmar Simonsen, sum selur teir vælumtóktu Daewoo bilarnar í Føroyum. Daewoo Marathon Cup er samansett av fýra rennikappingum, ið tilsamans verða 42.195 metrar ella tað sama sum eitt heilt marathon til longdar. Seinasta ár vóru tað heili 200 børn og vaksin sum tóku lut í teimum fýra kappigunum. Í ár verða kappingarnar í hesi raðfylgju: **sí talvu I.**

Vinnari av Daewoo Marathon Cup verður tann rennarin, sum samanlagt hevur brúkt minstu tíðina at gjøgnumføra tann samlaða teinin uppá 42.195 metrar. Kappingin verður skipað fyri bæði kvinnur og menn. Fyri hvørt umfar verða latin heiðursmerkir til nr. 1, 2 og 3. Samlaði vinnarin av Daewoo Marathon Cup fær kr. 500, meðan nr. 2, 3, 4 og 5 fáa ávikavist kr. 400, 300, 200 og 100. Eisini verða steyp latin til nr. 1, 2 og 3. Sum nakað nýtt verður eisini ein bólkur fyri veteranar í ár, tvs. fyri tey, sum eru fødd í 1956 ella fyrr.

**Eisini Mini Marathon Cup fyri børn í ár**

Dreingir-7/Gentur-7
(f.1995 ella seinni)
Dreingir-10/Gentur-10
(f.1992-1994)
Dreingir-13/Gentur-13
(f.1989-1991)
Dreingir-17/Gentur-17
(f.1985-1988)

Barnakappingin leygardagin er eisini partur av Daewoo Mini Marathon Cup fyri børn. Hjá børnunum verður kappast í fýra aldursbólkum, sum verða teir somu sum í Grand Prix kappingini, sum hevur verið í summar, tvs. Daewoo Mini Marathon Cup er eisini samansett av fýra rennikappingum, men verða hesar tilsamans 4.219 metrar (ella 1/10 marathon) til longdar hjá dreingjum og gentum -13 og -17. Hjá dreingjum og gentum -7 og -10 verður samlaði teinurin 2.109 metrar (ella 1/20 marathon). Vinnari av Daewoo Mini Marathon Cup verður so tann renn arin, sum samanlagt hevur brúkt minst tíð til at gjøgnumføra tann samlaða teinin. Fyri hvørt umfar verða latin heiðursmerkir til nr. 1, 2 og 3. Eisini hjá børnunum verða steyp latin til nr. 1, 2 og 3 samanlagt, tvs. bert børn, sum hava gjøgnumført øll fýra umførini, telja við í samlaða úrslitinum av Daewoo Mini Marathon Cup.

Fyrireikararnir úr teimum trimum feløgunum leggja dent á, at rennikappingarnar eru fyri øll, og vóna teir, at luttøkan verður eins góð, sum hon hevur verið í rennikappingunum í summar.

**Talva I**

| Umfar | Dagur | Teinur | Staður | Kapping |
|---|---|---|---|---|
| 1. | 31. aug. | 1/2-marath. (21,1 km) | Tórshavn | |
| 2. | 14. sept. | 5 km | Klaksvík | Daewoo Renning |
| 3. | 12. okt. | 10,5 km | Toftir | Runt Agnið |
| 4. | 26. okt. | 5,6 km | Kambsdalur | Daewoo Renning |

# Todi er bestur av øllum

**Føroyski FCK spælarin fær eitt orduligt herðaklapp frá fyrrverandi venjara hjá FCK**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Eftir at Todi Jónsson í stórdystinum ímóti Brøndby leygardagin bara var fjórði álopsmaðurin hjá FCK varð staðfest, at føroyski spælarin var settur í skuggan í góða summarveðrinum í danska høvuðsstaðnum.

Í fyrradagin fekk Todi Jónsson, sum fyrrapartin í dag fer til Georgia at spæla Europa Cup, eitt orduligt herðaklapp.

Christian Andersen er venjari í Farum. Eitt stutt skifti var hann venjari hjá FCK, og hann hevur sagt um seg sjálvan, at hann er besti venjarin í Danmark!

Farum venjarin er opinskáraður, og hann hevur avgjørdar áskoðanir. Í Ekstrablaðnum í fyrradagin helt hann, at superligan var í tveimum pørtum. Í øðrum partinum var FCK, og í hinum partinum vóru øll hini ellivu liðini. Venjarin vísti á, at FCK er so máttmikið, at um teimum tørvar ein spælara, so líta teir seg í kring og keypa so tann besta til júst tað plássið.



*Besti álopsleikarin í Danmark? Tað heldur í øllum før um Christian Andersen, sum eisini rópar seg sjálvan besta venjaran í Danmark*

Sum dømi um hvussu máttmikið FCK er, vísti Christian Andersen á álopsmanningina. Tá tað stóð á leygardagin, setti venjarin Zuma og Toda á vøllin, og so skoraði FCK sigursmálið. Christian Andersen segði seg rokna teir báðar, sum vóru á beinkinum frá fyrsta bríksli, at vera teir bestu í Danmark, og hann sigur seg rokna Toda Jónsson at vera besta álopsspælara av øllum í Danmark.

Tað var ikki eiti á herðaklappi. Spurningurin er so, hvat Todi kann brúka tað til í støðuni, sum hann nú er í. Klokkan trý føroyska tíð seinnapartin í morgin fer FCK at spæla á spildurnýggjum stadion í Tbilsi í Georgia. Rúm er fyri 31 túsund áskoðarum. Tað ber ikki til at ímynda sær annað, enn at Zuma og Todi fara at vera í FCK álopinum.

FCK vann dystin í Keypmannahavn 3–1, og Todi Jónsson skoraði tvey mál.

# Rosenborg er favorittur

**Undan norðurlendska stríðnum heldur Ståle Solbakken norska liðið vera betri fyri enn Brøndby**

EUROPA CUP
*Jóannes Hansen*

Í kvøld verður gjørt av, um tað verður norska Rosenborg ella danska Brøndby, sum skal vera í hattinum, tá lutur fríggjadagin verður kastaður um, hvussu liðini skulu bólkast í europeisku meistarakappingini.

Rosenborg er í Brøndby við 1–0 sigri í viðførinum. Tað vil siga, at um Brøndby skal hugsa um at vinna samantalt, so skulu teir skjóta mál, og samstundis skulu teir syrgja fyri, at Rosenborg ikki fær mál. Um tað eydnast norska liðnum at fáa mál, so verður mótbrekkan hjá Brøndby tung, tí so skal danska meistaraliðið skora tríggjar ferðir.

Nógv verður tosað og skrivað undan stóra slagnum. Norski Ståle Solbakken, sum hevur spælt bæði við AaB og FCK, heldur, at Rosenborg er favorittur. Hann gevur teimum 65 prosent og Brøndby 35 prosent.

Ståle Solbakken heldur, at tað hevur nógv at siga, at norska landskappingini er í hæddini, meðan teir í Danmark júst eru farnir undir eitt nýtt kappingarár. Hann heldur eisini, at tað er Rosenborg til fyrimunar, at teir ofta hava spælt týdningarmiklar europeiskar dystir.

Tað verður roknað við fullsettum stadion í Brøndby. Har rúmast 22.000 áskoðarar. At Rosenborg av álvara fer at kenna seg á útivølli heldur Ståle Solbakken ikki fer at darva norska liðnum nakað serligt.